

# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 31
Februar 2017

ISSN 1603-0036

- Kongaligt gullbrúdleyp
- Europa 2017: Borgir
- H. C. Lyngbye 1817
- 1200 sjómíl í kajak á opnum havi
- 40 ára framsýning hjá Posta

Posta
FAROE ISLANDS



Myndin verður avdúkað seinni
FO 858




# Kongaligt gullbrúdleyp

*"… Der skal undertiden stor tapperhed til at være oprigtig. Denne tapperhed repræsenterer prinsesse Margrethe i fuldt mål ved at sige sandheden, enkelt og uindskrænket: Hvad enten der hersker idyl eller usikkerhed og krig omringer os, så forelsker vi os og forlover os og gifter os og finder den tryghed og rigdom, som består i at få hinanden og i det fællesskab kan grunde det hjem, der danner grundlaget for vor tro og tillid til en fremtid.*

*Vi her på øerne har sandsynligvis haft lejlighed til at se prinsesse Margrethe oftere end tilfældet er for mange andre i kongeriget. Vi har hilst på hende som lille pige og vi har mødt hende som voksen. Hendes ukunstlet venlige og friske væsen er for de fleste, der her mødte hende, de bedste egenskaber hos en kommende regent.*

*Og derfor vil mange venlige tanker gå til Holmens kirke med de bedste fremtidsønsker for prinsesse Margrethe og den livsledsager, som hun af eget hjerte har udvalgt til at stå ved sin side i kommende dage."*

M.a. soleiðis ljóðaði oddagreinin í Dimmalætting tann 10. juni 1967, dagin tá táverandi danska krúnprinsessan giftist franska greivanum Henri Marie Jean André de Laborde de Monpezat.

Og tað var brúk fyri nøkrum vóngevandi orðum hendan summardag, har heimsins stríð og órógv annars setti dám á tíðindaflutningin. Sama dag endaði sonevnda 6 daga kríggið í Miðeystri og egyptiski forsetin Nasser var farin frá dagin fyri. Í Grikkalandi hevði hernaðarjuntan framt ríkiskvett tveir mánaðir frammanundan og sett fólkaræðið úr gildi. Eystanfyri herjaði sokallaða mentanarkollveltingin í Kina – og í Vietnam, har brúðgómurin varð føddur, tóktist kriggið bara at standa við og versna.



Margreta drotning og Heindrikur prinsur
á vitjan í Føroyum í 2010. Mynd: Scanpix.

So, tað vóru ikki tey mest tespuligu tíðindini, sum merkti forsíðurnar á dagbløðunum, summarið 1967. Tað man tí hava verið ein lætti hjá oddagreinskrivaranum, at leggja heimsins stríð og vreiði frá sær eina løtu – og í staðin skriva um eitt av okkara meira dámligu lyndiseyðkennum, kærleikan.

Søgan byrjaði annars í 1964, tá krúnprinsessan Margretha var á lestrarferð í Onglandi. Har hitti hon franska sendiharran Henri de Monpezat, sum tá starvaðist á fronsku sendistovuni í London.

Tað rann saman teirra millum og í 1966 trúlovaðust tey hvørjum øðrum. Árið eftir, tann 10. juni 1967, giftust tey í Holmens Kirke í Keypmannahavn – og samstundis fekk brúðgómurin heitið: Hansara kongaliga hátign, Heindrikur prinsur av Danmark.

Árið eftir, tann 26. mai 1968 varð fyrsti sonur teirra, Fríðrikur krúnprinsur, borin í heim – og 7. juni 1969 fingu tey ein son afturat, Joachim prins.

Í 1972 doyði Fríðrikur kongur 9. og krúnprinsessan var skírd Margretha 2. drotning av Danmark.

Heimurin er nógv broyttur hesi 50 árini síðan vakra brúdleypið í Holmens Kirke, bæði til tað betra og tað verra. Í hesum broytingartíðum hevur danska kongahúsið tó verið ein støðugur táttur – og gullbrúðarparið hevur til fulnar røkt sínar skyldur á ríkisrættarliga, umboðandi og ikki minst mentanarliga økinum.

Tí senda vit, eins og oddagreinskrivarin í Dimmu fyri 50 árum síðani, gullbrúðarparinum øll góð ynskir og ynskja hjartaliga til lukku við degnum.

*Anker Eli Petersen*










FO 859-860

Royndarprent

# Europa 2017: Borgir

Viðhvørt noyðist man at leggja kortini og melda pass. At viðganga, at ein ikki kann vera við, tí man ikki hevur røttu kortini í hondini.

Soleiðis var við fyrireikingunum til ársins EUROPA frímerki, har myndevnið er borgir. Hvussu vit vendu og snaraðu evninum, var onki at gera – vit hava ongar borgir í Føroyum.

Okkara kortspæl hevur ongantíð havt royalu spælikortini, ið eru fortreytin fyri borgarbygging. Føroyar hava altíð verið eitt nøkunlunda stættarleyst samfelag uttan óðalstættir ið sótu ovast á kransakøkuni. Bara fæloysingar og bøndur, sum hildu seg til meira praktiskan byggisið – laðaðar kroysur og hús úr timbri, við einari passandi tungari flagtekju at taka broddin av froysandi atlantsódnum. Allarhelst hava børnini til allar tíðir bygt borgir av spælikortunum, men tað er ikki ordiliga tað sama.

Í einari av sínum heldur bombastisku løtum, kallar Janus Djurhuus, meginskaldið, Føroyar "Havborgin fríða". Og okkurt er um pástandin hjá Janusi. Okkara fjallríka land minnur eitt sindur um eina borg. Við steyrrættum múrum av blágrýtisbergi, fjallatindum, ið tróna sum borgartorn móti høgum himli – fyri ikki at tala um ómetaligu borgargryvjuna, sum røkkur til Noregs strendur eystanfyri og Ísland vestanfyri. Ei undur í at vit fingu frið fyri bál og brandi, ið herjaði meginlandið í øldir. Bara at taka seg yvir borgargryvjuna var óðamannaverk.

So, nei - at byggja borgir er ikki akkurát vit. Í roynd og veru hava vit bert tvey bygningsverk í landinum, ið við einum góðum vilja kunnu minna um borgarvirki – og harafturat kravdu mikið grót og ómetaligt knoss at byggja: Havnar skansi og múrurin í Kirkjubø. Tað vóru sjálvandi útlendingar ið stóðu aftanfyri hesi anleggini. Føroyingar sjálvir brýggjaðu seg ikki um at nýta tíð og orku upp á tílikt. Satt at siga bannaðu havnarmenn danska yvirvaldið niður í sand og øsku, tá teir undir valdsboði noyddust at byggja Skansan lidnan seinast í 18. øld. Enn verri gekk í 14. øld, tá Erlendur bispur vildi hava stásiliga dómkirkju í Kirkjubø. Sambært



Málningur í Nólsoyar skúla.
Skúlabørn hava málað í samstarvi við Eli Smith, listamann.

søgnini fóru menn beinleiðis til hendurs yvir arbeiðið og kostnaðin. Einasta borgarakríggj ið føroyingar hava upplivað – og tað um eina grótkirkju.

So, nei – borgir og líknandi glæstribygging er ikki beinleiðis nakað vit hava royndir av. Harafturímóti hava vit eina søgn um eina kongsdóttir, sum ikki vildi búgva í fedranna-borgini – og flutti til Føroya. Og tað er ein søga vit kunna finna okkum í.

**Kongsdóttirin í Nólsoy**
*(Leysliga eftir grein í "Ungu Føroyar" nr. 3, 1908).*

Eftir hvat sigst, hava skotar havt seks kongar ið bóru Jákupsnavnið. Ein av hesum, ongin veit longur hvør, var faðir at fyrrnevndu kongsdóttir.

Tá á døgum vóru fleiri smáríki í Skotlandi og hvørt hevði sín egna kong, vanliga róptir "neskongar". Ein av hesum neskongum vildi hava kongsdóttrina – og hon hann. Men Jákup kongur vildi ikki lata dóttrina giftast við honum, tí hann helt tað vera undir hennara tign.

Men tey bæði ungu giftust í loyndum, og síðan noyddust tey at rýma av landinum undan konginum, sum var í øðini og vildi drepa mannin.

Tey bæði ungu flýddu til Føroya og búsettust í Korndali í Nólsoy. Um tað mundið var onki fólk eftir í Nólsoy, sum stutt frammanundan varð herjað av svartadeyða.

Toftin eftir húsinum har kongsdóttirin og maðurin búðu, sæst enn í Korndali. Innan grindina var ein kelda, hon kundi bera vatn frá. Hendan keldan finst enn og kallast Prinsessukeldan.

Tíðin leið og tey fingu ein son saman, men hjúnini livdu í áhaldandi ræðslu fyri at Jákup kongur skuldi finna tey.



Málningur í Nólsoyar skúla.
Skúlabørn hava málað í samstarvi við Eli Smith, listamann.

Og so ein dagin sóu tey eitt stórt skipafylgi stevna inn á Nólsoyarfjørð. Ungu hjúnini vóru beinavegin greið yvir, at tað var Jákup kongur, sum leingi hevði leitað eftir rýmdu dóttrini. Kongsdóttirin visti at faðirin var komin fyri at gera av við mannin – og bað hann tí sleppa sær til fjals og krógva seg, meðan hon sjálv tók ímóti kongi.

Síðan fór hon sjálv við barninum oman á Halgutoftir, stutt frá Korndali, har skipið hjá kongi lendi. Tá hon møtti pápanum, dró hon klæðini frá bringuni og bað hann um fyrst at stinga seg og barnið, áðrenn hann gjørdi manninum nakað.

Meðan hon talaði, var barnið farið at brosa og pjátra við kongin og rætti út eftir gullskreytinum hann bar. Tá loysnaði fyri hjartanum á kongi og við tárum í eygunum fevndi hann barnið. Faðir og dóttir sættust og boð vórðu send til mannin um at koma frítt fram, so kongur kundi eira ungu hjúnini. Hann vildi hava tey við sær heimaftur til Skotlands, men tað vildu tey ikki – og vóru búgvandi í Nólsoy alla sína ævi.

Í einum øðrum frábrigdi av søgnini verður sagt, at tá Jákup kongur setti fótin á land í Nólsoy, var fyrsta fólkið hann sá, abbasonurin, sum sat og spældi í mølini. Kongur kendi beinanvegin drongin og øðin rann av honum, tá hann heilsaði upp á barnið.

Eftir hetta, settust fleiri fólk niður í Korndali og toftirnar eftir húsunum hómast enn í lendinum.

Í núverandi bygdini í Nólsoy stendur eitt hús ið kallast Kongsstova. Tað er, eftir hvat sigst, fyrsta hús í bygdini – og skal vera reist av einum soni til skotsku kongsdóttrina. Tað finnast enn familjur í Nólsoy (og í Hetlandi), ið sigast stava frá útlagnu kongsdóttrini og manni hennara.

Um hald er í søgnini? Tjaee, tað er í hvussu er ein góð søga – og søgur virða vit føroyingar hægri enn alheimsins borgir og slott.

*Anker Eli Petersen*




FO 861-864 Royndarprent













# H. C. Lyngbye 1817

## Plantufrøðingurin Hans Christian Lyngbye og ferð hansara til Føroya í 1817

Tann 9. juni 1817 steig danski plantufrøðingurin og guðfrøðingurin Hans Christian Lyngbye (1782-1837) á land í Havn. Ætlan hansara var at savna og granska taraplantur í Føroyum. Summarið 1817 ferðaðist hann kring alt landið at gera rannsóknir. Á hesi ferð fann hann bæði nýggjar taraplantur og vanligar plantur, men Lyngbye var eisini áhugaður í øðrum enn plantum, tí í Føroyum kom ferð hansara at gera mun innan nógv ymisk øki frá fólkaminnisfrøði og bókmentum til fornlutir og minnisgripir.

Nú tað eru 200 ár síðani Lyngbye var í Føroyum gevur Posta út fýra frímerkir við myndevnum úr tekningum Lyngbye.

**Lyngbyestør**

Navnið Hans Christian Lyngbye er kanska gloymt millum manna í dag, men navnið er at finna í plantunøvnum sum t.d. í Lyngbyestør *(Carex lyngbyei)*. Lyngbye fann hesa plantuna í Føroyum í 1817. Lyngbyestør varð síðani lýst í Flora Danica, ið var ein verkætlan har allar danskar plantur vóru skrásettar frá 1761-1863. Hetta gjørdi stjórin á Botaniska Havanum í Keypmannahavn, professari í plantufrøði J. W. Hornemann (1770-1841). Lyngbyestør er at finna víða, vanlig í Íslandi, men heldur sjáldsom í Føroyum.

**Søgan um ferðina hjá Lyngbye**

Sum ungur hevði Lyngbye lært seg sjálvan plantufrøði, tá hann var privatlærari í Norðurjútlandi, har hann brúkti kendu bókina hjá Hornemann.

Í 1816 varð skipað fyri kapping á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn um at lýsa danskar taraplantur. Lyngbye sendi eina prísuppgávu inn og vann. Áðrenn Lyngbye kundi geva hetta tilfar út í bók, mátti hann



Lyngbyestør í botaniska havanum
uttanfyri Fróðskaparsetrið. Mynd: Ole Wich

hava plantur úr norðuratlantiska økinum við eisini - Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Lyngbye fekk fríða ferð við skipunum hjá Kongaliga Einahandlinum og seinni fekk hann stuðul frá einum ríkum vælgerðarfólki og frá *Ad usus Publicos* grunninum.

Í 1819 kom verkið *Tentamen Hydrophytologiae Danicae* út. Her vóru ikki minni enn lýsingar av 321 plantum við koparstikkum av 267 plantum á 70 myndum. Verkið varð stuðlað av Fríðriki VI og kostaði ikki minni enn 3.000 ríkisdálar at prenta. Danski regenturin gav heldur fátæka Lyngbye alt upplagið, burtursæð frá eini 30 eintøkum, ið hann tók sær sjálvum.

Tentamen hjá Lyngbye var eitt slóðbrótandi verk, viðurkent víða um heimin. Verkið økti um kunnleikan um taravøkstur í Norðurlondum og í Føroyum. Í verkinum legði Lyngbye nógvar nýggjar plantuflokkar fram umframt nýuppdagaðar plantur.

**Tarafrímerki**

Á frímerkinum til minnis um arbeiðið hjá Lyngbye, síggja vit eina plantu frá hansara plantusavni, ið er at finna á Botanisk Museum í Keypmannahavn. Hendan plantan varð funnin av Lyngbye í Hoyvík tann 27. juni í 1817.

Hitt frímerkið avmyndar eina tekning av tveimum taraplantum, sum eru frá upprunaligu tekningunum hjá Lyngbye. Hesar tekningar vórðu seinni brúktar í *Tentamen Hydrophytologiae Danicae*. Á hesi tekning síggja vit tvær taraplantur spegladar. Hetta taraslagið kallast *Chondrus crispus*, báðar eru savnaðar av Lyngbye, onnur hin 27. juli 1817 í Havn og hin frá februar 1816 í Hofmansgave á Fyn har Lyngbye arbeiddi.

**Alfrøðingurin Lyngbye**

Lyngbye skrivaði eisini eina ritgerð um grindadráp í Føroyum í 1817, ið gav honum eina silvurmedalju frá Kongaliga Danska



Tekning hjá Lyngbye av Kirkjubømúrinum.

Vísindafelagnum (Det Kongelige Danske Videnskabernes Selskab). Hann skrivaði eisini ferðafrásagnir. Ein av hesum var um brúdleypssiðir í Føroyum og um kvæðini, sum fólk kvóðu og dansaðu til eitt slíkt høvi.

Hann skrivaði eina langa frágreiðing um fornminni, serliga um Kirkjubømúrin. Hesa sendi hann til Kongaligu Nevndina til Varðveiting av Fornminnum (Den Kongelige Kommission til Oldsagers Opbevaring) í Keypmannahavn. Tað er orsakað av hesum lýsingum og tekningum at toftin í Kirkjubø varð friðað og gjørdist fremsta minnismerkið í Føroyum.

**Rinkusteinar og doypifuntar**

Á tí eina frímerkinum síggja vit tekningar eftir Lyngbye av Rinkusteinunum í Oyndarfirði, eina gamla innskrift høgd í grót á Tinganesi í Havn og tveir doypifuntar. Hesar tekningar eru at finna á Tjóðsavninum í Danmark. Doypifuntarnir eru úr Sumba og úr kirkjuni á Nesi í Eysturoy.

Ferð Lyngbye í 1817 ávirkaði nógv ymisk øki innan føroyska mentan, frá plantufrøði til fólkaminnisfrøði og fornaldarfrøði. Tað vóru menn sum Lyngbye, ið slóðaðu fyri at onnur fylgdu teirra fótasporum til fjarskotnar leiðir og soleiðis gjørdu útjaðaran Føroyar til ein part av Evropa.

*Kim Simonsen & Ole Wich*



Í kajakk gjøgnum "Sundini".

# Í kajakk 1200 fjórðingar á víðum havi

Í fjør summar løgdu teir báðir nútíðar ævintýrarnir Oliver Hicks og George Bullard út á hav í teirra tillagaðu Inuk Duo 6,8m kajakk. Málið var at rógva úr Grønlandi til Skotlands. Hetta er teirra søga, søgd av George Bullard.

*"Klokkan er 05.15 um morgunin, vit eru staddir í Norðuratlantshavi, 70 fjórðingar úr landi. Sólin er við at koma um sjónarringin og vit hava róð okkara 26 fóts kajakk uttan steðg seinastu 30 tímarnar. Vit eru útlúgvaðir, síggja yvir okkum og staddir í deyðaváða."*

---

Í 1728 kom ein inuittur rógvandi inn á eina vág í landnyrðingspartinum av Skotlandi, stutt frá Aberdeen. Hann var í kópaskinsbúna, róði eina grønlendska kajakk, bygd av beini og feldi – og hevði øll veiðiamboð við sær. Hann doyði 3 dagar seinni.

Ongin veit hvussu maðurin var komin hagar – um hann veruliga hevði róð 1200 fjórðingar úr Grønlandi, ella hann var fluttur á annan hátt. Tað var hetta, vit høvdu sett okkum fyri at svara – ella, um ikki annað, at meta um hvørt hann var førur fyri at rógva tann langa teinin.

**Ávegis**

Tað var við blandaðum kenslum, at vit flotaðu kajakkina við grønlendska ískantin – frá ræðslu fyri hvat bíðaði okkum, til vánirnar at uppliva veruligt og fyrilitsleyst váðaverk. Vit vóru í ferð við at gera nakað, ið allarhelst ongin hevði roynt frammanundan – og váðin var stórur, ómetaliga stórur!

Vit royndu sum frægast at búleikast umborð á kajakkini, hvíldu og róðu samstundis, bara ein tumma yvir ískøldum havi. Sjógvurin var svartur og hendurnar hveptu seg, hvørja ferð tær nurtu hann. Hetta fekk meg at undrast yvir hvussu djór yvirhøvur megnaðu at



Oliver Hicks og George Bullard.
Tveir nútímans ævintýrarar. Mynd: Oliver Hicks

yvirliva í slíkum arktiskum kulda. Bara ílatnir turrbúna, bjálvaður við ullintum klæðum, stríddust vit móti eirindaleysa veðrinum, til vit, eftir at hava róð í 46 tímar, lendu á einari strond í útnyrðingspartinum av Íslandi. Illa nokk førir fyri at standa uppi, stríddu vit okkum niðan at einari á og sukku saman á bakkanum.

---

Tað er ómetaliga tvørligt at búleikast umborð á einari kajakk – sjálvt minsti lutur tyktist at taka tímar at fremja. Tað var av alstórum týdningi, at vit fingu heitan mat, soleiðis at vit kundu standa ímóti okkara størstu hóttan – lágum kropsyli. Men, sum skilst, at kóka mat umborð á báti er trupult – og í einari kajakk er tað næstan ógjørligt.

Næstu tvær vikurnar róðu vit 600 fjórðingar fram við bergmiklu íslendsku

## Í STUTTUM

**HVØR?** Oliver Hicks (34) og George Bullard (27).

**HVAT?** Ein eindømisferð í kajakk úr Grønlandi til Skotlands, umvegis Ísland og Føroyar.

**NÆR?** 30. juni 2016 løgdu teir út frá Grønlandi. Hicks og Bullard fullførdu ferðina, tá teir komu til Balnakeil Bay í Skotlandi, tann 4. september 2016. Samanlagt 66 dagar.

**FERÐAHÁTTUR:** Ein umbygd Inuk Duo 6,8m havgangandi kajakk, gjørd av koltrevjum og klædd uttan við kevlar at verja móti ísi. Kajakkin er skjót og løtt, bygd til at ferðast langar leiðir.

Meira um ferðina á http://www.olly-hicks.com/new-blog/



Hicks og Ballard komu til Tjørnuvíkar klokkan trý
um morgunin. Í sjónarringinum standa hóttandi skuggamyndirnar
av Risanum og Kellingini, sum tigandi vitni til teirra bragd. Mynd: Harald Bjorgvin.

útnyrðingsstrondini. Vit sigldu framvið stórbærum fjørðum og fjøllum – og vit hittu sera fyrikomandi og gestablíðum fólki, ávegis til seinasta steðgin áðrenn vit skuldu leggja út á hav móti Føroyum.

**Úr Íslandi til Føroya**

Teinurin úr Íslandi til Føroya, var longsta og mest vandamikla strekkið um opið hav – illkent sum: *"The Devil's Dance Floor"*. Vit høvdu ongan fylgibát við okkum, so tá vit nú einaferð løgdu frá landi, var ongin vegur aftur. Vit vóru noyddir at hava allar neyðsynjarvørur við okkum, frá vesipappíri til drekkivatn. Hesin teinurin kundi taka upp til eina viku og, sjálvandi, veðurforsøgnirnar eru ikki álítandi so langt úr landi – tí var vandin stórur. Um hann øtlaði veðrið, høvdu vit onga verju.

Føroyar er kent fyri síni brøttu forberg ið standa steyrrætt úr sjónum – og tað var ein ógloymandi løta, tá vit umsíðir kendu land. 240 fjórðingar úr landi, meddaðu vit móti breiða munnanum á Sundalagnum. Havstreymurin gjøgnum sundini er harður, so sjógvurin kann verða stríður har um leiðir. Vit komu um trý tíðina á morgni, júst sum sólin var farin at rísa, umgyrdir av ómetaligum bergi og kyrrum havi. Vit tóku land, grulvaðu úr kajakkini og kendu rætt og slætt lætta yvir aftur at standa á fastari grund.

---

Vit høvdu nú verið heimanífrá í nærum tveir mánaðir og summarið var farið at halla. Veðurglottarnir vóru nú ikki bara styttri - tað var eisini longur millum teir. Veðurlagið var okkara eirindaleysi fíggindi – tað var einasti táttur, ið kundi avgera um hendan ferðin skuldi eydnast. Og, sanniliga, okkara fyrsta roynd at sigla yvir um *"The Devil's Dance Floor"*, endaði við at vit, triðja dagin, vóru tiknir upp av einum fiskiskipi, 50 fjórðingar úr landi – ein søga fyri seg.



Eftir at hava bíða í 3 vikur og eina miseydnaða roynd, hómaðu vit ein glotta og tepran møguleika at fara úr Føroyum við kós móti Skotlandi. Glottin var stuttur, so oyggin North Rona (45 fjórðingar í ein útnyrðing úr skotska meginlandinum) tóktist vera frægasta ferðamálið.

*"Klokkan er 05.15 um morgunin. Vit eru 70 fjórðingar úr landi á Norðuratlantshavi. Morgunsólin hóttir við at rísa um sjónarringin og vit hava róð okkara 26 fóts kajakk í samfullar 30 tímar. Vit eru útlúgvaðir, síggja yvir okkum og tað stendur um lív. Okkum tørvar svøvn, men óttast at veðrið skal taka okkum aftur."*

Bara minuttir áðrenn vindur og skrið østu sjógvin til froysandi snjóhvítar hestar, tóku vit land á North Rona – og tað var í seinastu løtu, vit fingu fast undir fótum. North Rona er ein oyðin oyggj uttan løkir, so nú vit vóru frammi, stríddust vit við yvirhøvur at yvirliva. Vit kláraðu okkum við at savna regnvatn av hellunum og veiða sjófugl.

---

Hvørt "The Finman" (inuitturin) megnaði at rógva langa teinin? Vit meta at tað eru aðrir, meira sannlíkir hættir ið gjørdu, at hann endaði í Aberdeen. Hann kann t.d. vera tikin upp av onkrum hvalabáti og settur út, tá hann gjørdist sjúkur.

66 dagar eftir at vit løgdu frá landi í Grønlandi, róðu vit kvirrir inn á Balnakeil Bay í Norðurskotlandi. Vit høvdu tá framt eitt verk ið neyvan nakar hevði framt undan okkum – og, um vit og skil skal ráða, neyvan nakar maður ger okkum eftir!

*George Bullard*




Sólrun Løkke Rasmussen letur framsýningina upp. Mynd: Steen J. Petersen

# 40 ára framsýning hjá Posta
## Heilsan frá einum frímerkjasavnara

Vikuskiftið tann 5. og 6. november 2016 varð 40 ára framsýningin hjá Postverki Føroya hildin á *Brev og Postkort Messe 2016* á Frederiksberg.

Sólrun Løkke Rasmussen lat upp framsýningina saman við Svanbjørg Manai, filatelistjóra og Flemming Petersen, formanni fyri FFF og frímerkjahandlarafelagið, og eisini ein av fyriskiparunum av framsýningini.



Svanbjørg Manai, filatelistjóri, Flemming Petersen, formaður í FFF, Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri og Sólrun Løkke Rasmussen. Mynd: Steen J. Petersen.

Savnarar av føroyskum frímerkjum vóru bodnir at sýna fram og meira enn 100 rammur vórðu meldaðar til. Har vóru nógv flott søvn frá teimum prefilatelistisku og fram til dagin í dag. Framsýnarar komu úr nógvum londum og sýndu fram ymisk tema innan fyri føroyska filateli.

Stóra altjóða luttøkan var týðulig og framsýnarar komu úr Føroyum, Danmark, Noregi, Svøríki, Týsklandi og Onglandi. Har vóru enntá frímerkjasavnarar, sum ikki sjálvir kundu møta, men sum vóru so beinasamir at senda framsýningartilfarið, so vit onnur kundu fáa gleði av tí. Stóra tøkk til tey sum virkaðu fyri at hetta var møguligt.

Sera nógv ymisk søvn vórðu sýnd fram. T.d. Føroyingahavnin, Postbáturin Ruth, prefilatelistisk postsøga og fram til í dag, annar heimsbardagi, klippfiskur, neopostur, stjørnustempul, luftpostur, nýggj postgjaldsmerki,



Ralf Masukowitz og hansara WW2
ramma við søguni um Neopost 446 Metermark.
Mynd: Steen J. Petersen

motivsøvn, variantsøvn, heftið 1975, Thorshavn dagstempul. Eitt fantastiskt arbeiði ið varð gjørt av framsýnarunum.

Leygarkvøldið hevði Posta ein døgurða fyri framsýnarum og samstarvsfeløgum. Sera flott og nógv sambond vórðu knýtt.

Eitt deiligt vikuskifti har nógvir av Føroyasavnarunum tosaðu týskt, enskt, norskt, svenskt og danskt. Øll nutu tey vøkru søvnini hjá hvørjum øðrum. Nógv arbeiði var løgd í søvnini og hetta var virðismett av teim vitjandi. Vitan var spjadd og tað var ein stór gleði fyri savnararnar at hitta so mong við somu áhugamálum. Samanumtikið eitt deiligt vikuskifti. Vónandi fari eg at hitta fleiri av savnarunum á øðrum framsýningum í framtíðini. Ongin kann ivast í at Føroyasavnararnir hava stóra gleði av sínum ítrivi.

Vinaliga
*Steen Jack Petersen*








Brian Hague, Svanbjørg Manai, filatelistjóri, og Peter Sondhelm. Mynd: Steen J. Petersen

# Nýggjar útgávur - 15. mai 2017



Nýggj útgáva: **Kongaligt gullbrúdleyp**
Útgávudagur: 15.05.2017
Virði: 50 kr.
Nummar: FO 858
Stødd, smáark: 130 x 75 mm
Stødd, frímerki: 40 x 40 mm
Design: Torben Eskerod / Jacob Monefeldt
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland
Postgjaldsbólkur: Grundgjald til innskrivað brøv

*Myndin verður avdúkað seinni*




FO 859-860 Royndarprent

Nýggj útgáva: **Europa 2017: Borgir**
Útgávudagur: 15.05.2017
Virði: 9,50 og 17,00 kr.
Nummar: FO 859-860
Stødd: 30 x 40 mm
Listafólk: Janus Guttesen
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: OeSD, Eysturríki
Postgjaldsbólkur: Smábrøv í Føroyum, 0-50 gr. og smábrøv til Evropa, 0-50 gr.




FO 861-864 Royndarprent

Nýggj útgáva: **H. C. Lyngbye 1817**
Útgávudagur: 15.05.2017
Virði: 9,50, 13,00, 19,00 og 22,00 kr.
Nummar: FO-855-856
Stødd: 30 x 40 mm
Listafólk: Kim Simonsen / Ole Wich
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: La Poste, Frakland
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til Evropa og onnur lond 0-50 gr, stórbrøv í Føroyum, 0-50 gr. og smábrøv til Evropa, 51-100 gr.

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Oliver Hicks og George Ballard í Tjørnuvík. Mynd: Harald Bjorgvin. Prentsmiðja: Føroyaprent.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps